## Fótbóltspengar til Haiti

Hvørt ár skipar UEFA fyri dysti, har endamálið er at savna pening til menningar- og neyðhjálp. Í ár verður dysturin spældur í Lissabon tann 25. januar, og ágóðin av tiltakinum fer hesaferð til neyðhjálp á Haiti. Franski Zinedine Zidane og brasilski Ronaldo hava savnað ein hóp av stjørnum saman, og fyribils telur listin hesi nøvn úr fótbóltsheiminum: Akwá, Káká, Marcelo, Luciano da Silva, Pavel Nedved, Michael Laudrup, Alfredo Esteves, Graeme Le Saux, Zinedine Zidane, Fabien Barthez, Christophe Dugarry, Jean Sony, Joseph Peterson, Baichung Bhutia, Edgar Davids, Phillip Cocu, Luís Figo, Fernando Couto, Pauleta, Gheorghe Hagi, Gheorghe Popescu, Lucas Radebe og Fernando Hierro.



## O'Shea fingið blóðpropp

John O'Shea hjá Manchester United hevur eftir øllum at døma spælt sín seinasta dyst hetta kappingarárið, eftir at hann í landsdysti fyri Írland í novembermánaði fekk eitt sokallað trælær. Hesin skaði hevur síðani tikið ilt fyri seg soleiðis, at O'Shea hevur fingið ein blóðpropp, sum ger, at írin ikki kemur á vøllin aftur hetta kappingarárið. Hetta eru keðilig tíðindi fyri Manchester United, sum hevur havt stóra gleði av O'Shea, sum spældi sín fyrsta dyst fyri felagið í 1998. Síðani er tað blivið til fleiri enn 350 dystir fyri Manchester United og 59 dystir landsdystir.

# Alt upp á spæl í Vági

**Dysturin í Vági millum VB og VÍF er uttan iva tann mest áhugaverdi í Sunset-kappingini hesa ferð, tí skal VB hava vón um at sleppa av botnplássinum, er kravið ein sigur á VÍF**




Hilmar Jan Hansen



VÍF-kvinnurnar, sum hava togað seg upp úr botninum síðstu dystirnar, hava eina torføra útivallaruppgávu, nú tær skulu til Vágs at spæla ímóti VB
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Kvinnurnar hjá VÍF eru farnar at røra upp á seg í síðstuni og hava hálað seg úr botninum, so tær nú lúra eftir fjórða plássinum hjá StÍF. Nú tær skulu til Vágs, verður mótstøðan væntandi stór, tí VB er botnlið og vil mest av øllum fáa samband við júst VÍF á stigatalvuni. Tað gevur í øllum førum vónir um ein spennandi og tættan dyst, har nógv stendur upp á spæl.

Stjørnan hevur havt vind í seglunum síðstu vikurnar, og nú ræður um hjá klaksvíkskvinnum at halda fram við góða stimanum. Hesa ferð eru tað kvinnurnar hjá Neistanum, ið koma á vitjan, og havandi fyrru dystirnar millum liðini í huga, ræður hjá teimum bláu mest um at minimera tapið.

Tjaldur, sum leingi var oddalið hjá kvinnunum, fekk eitt lítið bakkast í dystunum ímóti Stjørnuni, harav fleiri endaðu við tapi. Nú skulu kvinnurnar úr Runavík so yvir um fjørðin at spæla ímóti StÍF, sum í sínum lagi má fáa stig í skjáttuna, nú VÍF byrjar at hótta aftanfyri.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | |
|---|---|
| 24/01 14.30 | StÍF-Tjaldur |
| 24/01 15.00 | Stjørnan-Neistin |
| 24/0115.00 | VB-VÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | |
|---|---|
| 23/01 17.00 | Kyndil-Neistin |
| 24/01 16.00 | StÍF-KÍF |
| 24/01 16.00 | H71-VÍF |

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 24/01 14.00 | Mjølnir-Fleyr |
| 24/01 15.00 | SÍ-KÍF |
| 24/01 17.00 | Dráttur-TB |

**Eik-ligan, menn**

| | |
|---|---|
| 24/01 15.00 | Fleyr-SÍ |
| 26/01 19.30 | Mjølnir-ÍF |

# Fleiri kunnu skifta pláss

**Kappingin í Atlantic Airways-kappingini er so jøvn millum fimm av teimum seks liðunum, at hetta umfarið kann alt gerast tættari ella fara sundur aftur**

Neistin hevur bara tapt tveir dystir higartil hetta kappingarárið, og annar teirra var ímóti grannunum úr Kyndli. Tað er helst eisini so, at skal nakar gera nakað við Neistan, má helst granna-momentið takast við. Slagið um Havnina verður í morgin, og so verða hinir báðir dystirnir sunnudagin.

Har tekur StÍF á heimavølli ímóti KÍF, og her er talan um tvær ymsar formkurvar. StÍF hevur einki vunnið síðani hálvan november, meðan KÍF hevur vunnið so mikið, at botnliðið bara er eitt stig frá øðrum plássi. So er spurningurin, um venjaraskiftið hjálpir StÍF ella um KÍF sleppur av botnplássinum.

Triði dysturin er ein endurtøka av FM-finalunum síðsta kappingarár, men hvørki H71 ella VÍF hava víst somu styrki, sum tey høvdu tá. VÍF hevur eftir laka byrjan tikið seg fram, meðan avrikini yvirhøvur hava verið svingandi hjá hoyvíkingum, so hetta er enn ein púra opin dystur.

**hil**

## FM-vónir kunnu fáa høgg

**TB kann koma nærri finaluni og Dráttur kann nærkast hinum, samstundis sum hvørki Mjølnir ella Fleyr hava ráð at tapa, tá tey nú møta hvørjumøðrum**

Bæði Mjølnir og Fleyr, sum sunnudagin hittast í einum av klassikarunum í kvinnuflogbólti, ynskja sær pláss í FM-finalunum, har SÍ longu hevur fingið minst annað beinið innum. Mjølnir og Fleyr eru jøvn í stigum, so hvørki teirra hevur ráð at tapa nú – og serliga ikki, um tað eydnast TB at vinna á Drátti, tí so fær teirra finaluvón eitt skot fyri bógvin.

Tann dysturin er av tí sama ikki minni áhugaverdur, og nú fæst at síggja, um Dráttur megnar meira, enn liðið hevur víst, nú tað tvær ferðir á rað í týðandi dystum er eydnast at koppa Fleyr. TB, sum annars hevur arbeitt seg miðvíst upp eftir stigatalvuni í síðstuni, tapti í hálvfinaluni í Klaksvík fyri júst Drátti, so her stendur alt møguligt upp á spæl, nú hesi bæði bresta saman á Giljanesi.

Oddaliðið SÍ tekur hesa ferð ímóti unga KÍF-liðnum, ið framvegis eigur fyrstu stigini til góðar. Eingin ivi er um, hvør er favorittur henda dystin, og tað verður neyvan hesa ferð, at KÍF megnar at taka hála seg nærri upp í nánd av ÍF, sum á næstaftasta plássinum hevur fríumfar.

**hil**

## Fleyr og SÍ í finalustríði

**Enn snýr kappingin í mansflogbólti seg um at renna aftan á Mjølnir, so tí hevur tað alt at siga fyri Fleyr, at heimadysturin ímóti SÍ verður vunnin**

Dysturin sunnudagin hevur ikki sørt dám av hálvfinalu yvir sær, tí hann er millum tey bæði feløgini, sum royna at sleppa í FM-finalu ímóti Mjølnir. SÍ vann kappingina í Klaksvík við greiðum sigri á júst Fleyr, og sær út til at hava fingið luft undir veingirnar, men samstundis vil Fleyr óivað hava revansju, umframt at eitt tap pilkar av álvara við finaluvónirnar hjá havnarmonnunum.

Mjølnir hevur framvegis munin á hinum liðunum í Eik-liguni hjá monnum, og hagtalsliga talar lítið fyri, at øðrvísi verður eftir dystin hjá klaksvíkingum í hesum umfarinum, sum verður týskvøldið á heimavølli ímóti botnliðnum, ÍF, sum enn jagstrar fyrstu stigini. Í Føroya Banka-kappingini síðsta vikuskiftið megnaði ÍF eisini bara at vinna á TB, sum er í næstbestu deildini.

**hil**

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 345 | 245 | 100 | 21 |
| 2 | Tjaldur | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 332 | 242 | 90 | 19 |
| 3 | Neistin | 12 | 7 | - | 0 | - | 5 | 318 | 289 | 29 | 14 |
| 4 | StÍF | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 289 | 354 | -65 | 8 |
| 5 | VÍF | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 285 | 338 | -53 | 6 |
| 6 | VB | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 226 | 327 | -101 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 353 | 296 | 57 | 18 |
| 2 | VÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 328 | 314 | 14 | 10 |
| 3 | StÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 298 | 310 | -12 | 10 |
| 4 | Kyndil | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 273 | 296 | -23 | 10 |
| 5 | H71 | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 282 | 294 | -12 | 9 |
| 6 | KÍF | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 270 | 294 | -24 | 9 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 10 | 10 | - | 0 | 30 | 3 | 27 | 20 |
| 2 | TB | 10 | 7 | - | 3 | 24 | 12 | 12 | 14 |
| 3 | Mjølnir | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 16 | 6 | 12 |
| 4 | Fleyr | 10 | 6 | - | 4 | 20 | 16 | 4 | 12 |
| 5 | Dráttur | 11 | 5 | - | 6 | 20 | 19 | 1 | 10 |
| 6 | ÍF | 11 | 2 | - | 9 | 6 | 28 | -22 | 4 |
| 7 | KÍF | 10 | 0 | - | 10 | 2 | 30 | -28 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 11 | 9 | - | 2 | 29 | 11 | 18 | 11 |
| 2 | SÍ | 11 | 7 | - | 4 | 25 | 18 | 7 | 8 |
| 3 | Fleyr | 11 | 5 | - | 6 | 25 | 22 | 3 | 6 |
| 4 | ÍF | 11 | 0 | - | 11 | 2 | 30 | -28 | 0 |